# Føroyaskeið fyri útlendingum á Setrinum

Fróðskaparsetrið hevur nú gjørt av, at hava enn eitt føroyamálsskeið fyri útlendingum.

Í summar skipaði Føroyamálsdeildin á Fróðskaparsetrinum nevniliga fyrstu ferð fyri summarskeiði í føroyskum máli og mentan fyri útlendskum studentum og undirtøkan var sera góð. So gott sum fullteknað var til skeiðini. Tilsamans vóru omanfyri 30 studentar úr fleiri enn 10 londum við á skeiðnum.

Tey, sum vóru við á seinasta skeiðnum, høvdu nógvar ymiskar orsøkir at koma til Føroya, summi vildu sleppa til eitt fjarskotið land og læra seg eitt, í teirra verð, eksotiskt mál. Onnur komu til Føroya, tí tey høvdu røtur í Føroyum ella í øðrum Norðurlandi, og hetta hildu tey vera gott høvi hjá teimum at leita aftur til uppruna sín.

Tað skeiðið eydnaðist avbera væl, og skoðsmálini frá studentunum vóru so mikið góð, at føroyamálsdeildin á fróðskaparsetrinum nú hevur gjørt av at skipa fyri nýggjum skeiði komandi summar.

Skeiðið verður í døgunum frá 1. til 20. august 2005.

Á tílíkum skeiðum verður høvuðsdenturin lagdur á mál og mentan.

Undirvísingin er fyri tað mesta á enskum, men studentarnir sleppa eisini at royna seg á føroyskum. Tað er lagamanni at undirvísa á enskum um føroyskt mál og mállæru, tí Fróðskapar-felagið gav í summar út bókina : *Faroese - An Overview and Reference Grammar.* Høvundar av bókini eru Höskuldur Þráinsson, Hjalmar P. Petersen, Jógvan í Lon Jacobsen og Zakaris Svabo Hansen.

**eys**

# Stór og øðrvísi familjukonsert

Leygardagin 4. og sunnudagin 5. desember, skipar Føroya Symfoniorkestur fyri forvitnisligum og øðrvísi familjutiltaki. Talan er um konsertir serliga ætlaðar børnum og ungum. Tiltakið verður hildið bæði í Havn og í Runavík

Talan er ikki um nakra vanliga konsert hjá Symfoniorkestrinum, men eina barna-, ungdóms- og familjukonsert. At tiltakið serliga er ætlað børninum og teimum ungu, sæst eisini aftur í skránni.

## Skráin

Tónleikurin verður ikki vanligi symfoniskur tónleikur, men fjølbroyttur, lættur og undirhaldandi við joladámi.

Eisini ein søga verður at hoyra, tá ævintýrsøgan og tónleikaverkið »Kavamaðurin« verður framførd. Tónleikurin verður berandi parturin av søguni, og orkestrið er mannað av ungdómum úr ymsikum pørtum av landinum. Frásøgumaður verður Eyðun Johannessen og 13 ára gamla Konni Kass Jacobsen, sum vann kappingina um ársins songrødd 2003, fer at syngja solopartin í frásøguni um »Kavamannin«, við hjálp frá stóra orkestrinum.

Eisini verður eitt barnakór við 150 børnum úr Fuglafirði, Leirvík, Toftum of Tórshavn, sum fara at syngja.

Ungi Heini Andreasen fer at spæla »A Trumpeter's Lulaby«.

Eisini verður eitt lagatyssi við kendum jólaløgum at hoyra.

Frá Symfoniorkestrinum frætta vit, at kendi »Sleigh Ride« eftir Lee Roy Anderson eisini verður á skránni.

Ætlanin er eisini at hava onkran felagssang.

Dirigetur verður Bernhard Wilkinson.

## Atgongumerki

Lagt er upp til eina sera forvitnisliga og áhugavekjandi konsert, sum fólk vónandi fara at taka undir við. Hetta er fyrstu ferð, at ein tílík konsert verður hildin, ið serliga er ætlað børnum og ungum.

Kostnaðurin verður 75 krónur fyri vaksin og 50 krónur fyri børn.

Atgongumerki til konsertina í Havn, sum verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 04. desember kl 16, eru at fáa í Norðurlandahúsinum og Kunningarstovuni í Tórshavn.

Atgongumerki til konsertina í Runavík, sum verður í ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin 05. desember kl 16, fáast í Kunningarstovuni í Runavík og við dyrnar undan konsertini.

**eys**

# Bókacafé á Hafnia

Mikukvøldið verður bókacafé á Hafnia Lounge í Havn. Skráin verður fjølbroytt og spennandi. Kvinnuligir rithøvundar fara at greiða frá um sínar nýútkomnu bøkur og høvi verður eisini at frætta um aðrar nýggjar bøkur, sum eru komar út í seinastuni.

Á Hafnia siga tey soleiðis um kvøldið:

*»Kom og njót eina løtu í hugnaligum umhvørvið, fá íblástur til jólgávurnar og jólastákanina, set teg afturá og njót ein góðan kaffiduss, saman við øðrum javnsettum. Vit fara í bókahýri inn í jólamánaðin og fara hetta kvøldið at geva kvinnunum orðið«*

Á skránni verður m.a. kunning um hvørjar bøkur koma út til jóla, Sórún Michelsen fer at lesa úr egnum verkum, kunning um bókina »Okkara Millum« hjá Turið Kjølbro og greitt verður frá hvussu ein lesiringur verður til.

Bókacafé'in byrjar á Hafnia Lounge kl 20 mikukvøldið 1. desember. Øll eru vælkomin.

**eys**

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

HAVNAR BIO

Tlf. 3119 56

www.bio.fo




Týsdagin 30.11. kl. $20^{45}$ Mikudagin 01.12. kl. $20^{45}$
Hósdagin 02.12. kl. $20^{45}$




Týsdagin 30.11. kl. $18^{30}$ Týsdagin 30.11. kl. $22^{00}$
Mikudagin 01.12. kl. $18^{30}$ Mikudagin 01.12. kl. $22^{00}$
Hósdagin 02.12. kl. $18^{30}$ Hósdagin 02.12. kl. $22^{00}$




Týsdagin 30.11. kl. $19^{30}$ Mikudagin 01.12. kl. $19^{30}$
Hósdagin 02.12. kl. $19^{30}$




Týsdagin 30.11. kl. $16^{00}$ Mikudagin 01.12. kl. $16^{00}$
Hósdagin 02.12. kl. $16^{00}$ *– Seinasta sýning*

KOMANDI FILMAR




Frumsýning fríggjadagin 03.12. – Billettprísur 55,- kr.




Frumsýning fríggjadagin 03.12.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu